# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Tillukku Dáin!

**Hósdagin 1. apríl fylti umlættingarheimið Dáin í Klaksvík 15 ár. Ein rúgva av gestum vóru komin í føðingardag, har starvsfólk og brúkarar bjóðaðu køkur og kaffi. Og sjálvandi sungu øll við, tá Karl Martin Samuelsen treiv í at syngja "Tillukku til Dáan."**

MÓTTØKA
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Lívið hjá teimum brekaðu í Norðoyggjum er nógv broytt seinastu 15 árini. Og tað er ikki minst teimum, ið tóku stig til at byggja umlættingarheimið Dáan, fyri at takka. Hendan byggiætlan, ið byrjaði í tí smáa, umfatar nú bæði umlættingarheim, búfelagsskap umframt sambýli fyri autistar.

Dáin hevur 4 dag- og 6 døgn umlættingarpláss. Brúkarnir av dagplássunum hava vanliga ein fastan dag um vikuna, meðan døgnplássini verða nýtt mest í vikuskiftum og frítíðum. Mesta virksemið í húsinum er í vikuskiftunum, tá fólk, sum annars hoyra til aðrar stovnar, eisini ofta nýta høvi at koma at vitja.

## Í fremstu røð

- Tað er í grundini als ikki so langt síðani, at tey brekaðu vórðu send av landinum, tí vit onki høvdu at bjóða teimum herheima, segði Jona Nielsen, formaður í stýrinum fyri Dáan.

Fyri nógv av teimum bleiv Danmark teirra nýggja heim, og tey komu ongantíð heimaftur. Av teimum, sum komu heimaftur, máttu tey flestu til Havnar at vera, tí har vóru tey einastu tilboðini til tey í Føroyum. Í so máta er eitt stað, sum Dáin, onki minni enn ein kollvelting, við tað at tey, sum eru fødd í Norðoyggjum, sleppa at verða verðandi har, sum teirra familja eisini býr.

Jona tosaði eisini sum avvarðandi. Ommudóttir hennara, Jona, hevur sína dagligu gongd í Dáanum, og tí veit omman av egnum royndum, hvussu stóran týdning eitt stað sum Dáin hevur fyri trivnaðin hjá teimum brekaðu.

- Í Dáanum koma Jona og hinir brúkarnir í fremstu røð, og tað eru tey brekaðu jú ikki alt ov von við, segði Jona. Sum avvarðandi ivast vit onga løtu, í at umsorganin og áhugin hjá starvsfólkunum fyri teimum brekaðu kemur beint úr hjartanum. Tað vísa tey dag og dagliga, og tað merkja okkara børn og ommubørn, segði Jona Nielsen.



*Bæði brúkarar og avvarðandi vóru komin at ynskja Dáanum tillukku*



*Karl Martin Samuelsen setti dám á løtuna við sangi og spæli. Hann starvast dagliga í Dáanum*



*Á einum 15. ára føðingardegi hoyrir eisini ein rættur føðingardagssangur til*

## Flutt mørk

Jóna Olsen, leiðari á Verkstaðnum á Brekku, nýtti eisini høvi at bera Dáanum eina føðingardagsheilsan. Hon var fyrsti leiðarin á Dáanum og mintist, hvussu hugalig byrjanin var, tí við Dáanum gjørdist ein dreymur veruleiki fyri so nógv.

- Tá størvini skuldu setast, komu 150 umsóknir inn. So eg var so heppin at vera við til at velja tey allarbestu út, og tað er ikki minst teimum fyri at takka, at heimið hevur ment seg so nógv hesi árini, segði Jóna.

- Í fyrstuni var ikki so nógv virksemi í Dáanum, tí fólk dugdu ikki rættiliga at venja seg við tankan um, at eitt slíkt tilboð nú var veruleiki. Og tað sigur ikki so lítið um, hvat tey brekaðu og teirra avvarðndi høvdu verið noydd at taka til takka við.

- Dáin og Verkstaðið á Brekku vóru byrjanin til eitt nýtt tíðarskeið hjá teimum brekaðu í Norðoyggjum. Men stovnarnir hava eisini verið við til at flutt onnur mørk, soleiðis at tolsemi mótvegis teimum brekaðu er vorðið munandi størri, enn tað var fyri 15 árum síðani. Tá vóru tey ikki serliga sjónlig, tí tey vóru goymd burtur ein stóran part av tíðini. Nú eru tey her saman við okkum sum ein nátúrligur partur av býarmyndini. Og soleiðis eigur tað at vera, segði Jóna Olsen.

## Bussurin á veg

Umframt umlætting bjóðar Dáin eisini brúkarnum at luttaka í ymsum frítíðarítrivum runt um í býnum. Og um ikki so langa tíð verður tað eisni lagaligari hjá teimum at fara á útferðir aðrastaðni í Føroyum. Tey, ið varða av Dáanum, hava nevniliga tikið stig til eina innsavning til ein buss til búfólkið. Innsavningin gongur væl, so um ikki so langa tíð hava búfolkini sín egna buss standandi í túninum uppi á Mýruvegi í Klaksvík.



*Ommur og abbar vóru eisini komin í føðingardag*



*Jóna Olsen var fyrsti leiðarin í Dáanum*



*Jona Nielsen, stýrisformaður í Dáanum og omma at Jonu, sum eisini er brúkari*



*Irena Pedersen, leiðari, bjóðaði vælkomin*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Harald Haraldsen 50 ár



Sunnudagin 4. apríl fyllir Harald Haraldsen í Hoyvík 50 ár.

Eftir lokna skúlagongd fór Harald í læru sum bilmekanikari á bilverkstaðnum hjá P/F Vilhelm Nielsen í Havn. Har dámdi honum best at umvæla Bedford lastbilarnar, sum tað vóru nógvir av í Føroyum tá.

Miðskeiðis í 70-unum fór Harald at arbeiða hjá Super Dekk Service, har hann var í nógv ár. Hann koyrdi eisini býbuss í nógv ár.

Síðan 2001 hevur hann arbeitt sum lastbilaførari hjá P/f Just Sivertsen. Innan sítt starvsøki er Harald kendur sum ein raskur og arbeiðssamur maður.

Foreldrini hjá Harald vóru: Johanna, f. Joensen, ættað úr Kollafirði, og Ásmund Haraldsen, postmaður, ættaður úr Havn.

Harald er elst av trimum systkjum, systirarnar hjá honum eru: Ásla, sum býr í Danmark og Lis, sum býr í Hoyvík.

Ásla flutti til Danmarkar fyrst í 70-unum og giftist við Frits Skov, sum hevði arbeitt í Mjørkadali. Tey fingu sonin Ásmund, sum í dag er 21 ára gamal.

Nakað síðan kom Ásmund út fyri einari álvarsligari ferðsluvanlukku á motorsúkklu og misti annað beinið, og í mars í ár doyði maðurin, Frits, av krabbameini.

Føðingardagin verður Harald burturstaddur.

## Dagurin

**3. apríl. Nikaitas**, deyður í 824. Abbati í Grikkalandi. Í fornkirkjuni hildu teir, at 3. apríl var dagurin, tá ið Kristus varð krossfestur.

**4. apríl. Ambrosius**, deyður í 397. Biskupur í Milano, verður nevndur sum ein av kirkjufedrunum.

**5. apríl. Irene**, deyð umleið ár 300. Tikin av døgum saman við tveimum systrum.

# Finn Thorsen í smiðjuni



*Mynd Álvur Haraldsen*

Fríggjadagin 2. apríl kl. 14 læt Finn Thorsen upp málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Finn Thorsen er dani, føddur í 1936, og býr í Nyborg á Fyn. Hann hevur arbeitt sum fangavørður og seinnu árini sum hundaførari í fongslinum. Nú er hann farin frá fyri aldur.

Hann er sjálvlærdur listamaður, og hevur málað síðan hann var ungur.

Hann roynir ikki at hava nakran ávísan stíl, men hevur mest náttúrúruna sum myndaevni. Hann hevur havt fleiri framsýningar bæði í Danmark og í Norra. Seinnu árini hevur hann eisini arbeitt við skurðmyndum úr granitt.

Myndaevnini fær hann úr náttúruni, har sum hann ferðast.

Fyri 13 árum síðan var Finn í Føroyum fyri fyrstu ferð, og bleiv hann bergtikin av vøkru náttúruni við teimum stóru mótsetningum, sum har eru.

Síðan hevur hann ofta vitjað í Føroyum: Við tíðini eru flestu av hansara málningum úr vøkru og spennandi føroysku náttúruna.

Hansara listaverk eru olju ella akrylmálningar, vatnlitamyndir og ymisk sløg av grafikki og skurðmynd.

Nakað av hesum verður at síggja á framsýningini í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin er frá 2. apríl til og við 7. apríl.

Opið er soleiðis: fríggjadag frá kl. 14-20, leygardag frá kl. 10-16, og frá sunnudag til og við mikudag er opið frá 14-18.

Finn Thorsen verður eisini á framsýningini, sum Lions Club skipar fyri í Runavík á páskum.

## 80 ár

Í dag, 3. apríl, verður Mia Hansen, Klaksvík, 80 ár. Vælkomst verður í heiminum á Biskupsstøðgøtu frá kl. 16.00.

## 60 ár

Týsdagin 30. mars *fyltu* tvíburarnir Bjarni og Páll Skorastein, Leirvík, 60 ár.

Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í dag, 3. apríl, frá kl. 18.00.

## Brúdleyp

Leygardagin 27. februar *giftust* Rannvá Biskopstø, Klaksvík og Ian Leyni, Tórshavn á Ráðhúsinum í Keypmannahavn.

Í dag, 3. apríl, giftast á Ráðhúsinum í Odense Elsa Maria Petersen, Klaksvík, og Peter Møller, Odense.

Brúdleypsadressa: Karen Brahes Vej 8, st.th., 5000 Odense C.

Í dag, 3. apríl, giftast kl. 14.00 í Cafékirken, Tuomisvej 5, Frederiksberg, Teresa Johnsson, Kollafjørður og Thomas Andersen, Keypmannahavn. Brúdleypsadr.: Sonnerupgaard Gods, Tølløsevej 53, 4330 Hvalsø.

Í dag, 3. apríl, giftast kl. 15.00 í Laurbjerg Kirke, Kirkevej, Jórun Højgaard, Tórshavn og Høgni av Skarði, Laurbjerg. Brúdleypsadr.: Den Hvide Skole, Skolevej 1, Laurbjerg, 8870 Langå.

Í dag, 3. apríl, kl. 12.30 giftast í Kristuskirkjuni, Klosterbakken 11, Odense C, Amalie Árnadóttir Helmsdal og Morten Kühnrick. Brúdleypsadr.: Brúðarparið Kühnrich, Lundekærsvej 70, 5250 Odense SV.

Í dag, 3. apríl, kl. 16.30 giftast í Stefanskirke Jónrid Poulsen, Argir og Sørin Halling, Keypmannahavn. Brúdleypsadr.: Kastanjevej Efterskole, Kastanjevej 2, 1876 Fredriksberg C.

## Konfirmantar í Leirvíkar kirkju pálmasunnudag 4. apríl 2004:

<u>Kambsdalur</u>
Jan Ólavsson Ellingsgaard, Guðrun Lervig
<u>Fuglafjørður</u>
Uni Reinert Petersen, Fróði Karlsson Hansen, Heri Hansen Nesá, Karla Hansen, Borghild Juul, Guðrun Henrysdóttir Thomsen
<u>Leirvík</u>
Jón Eliassen, Bjarni Jensen, William Quinn Olsen, Janni Andreasen, Birna Dam, Anja Justinussen, Oddvør Klein, Fríðhild Reinert Norðgerð, Rannvá Lava Olsen, Laila Pætursdóttir, Esther Ryggshamar, Bodil Tórolvsdóttir